Nógv er broytt í Hoyvík

HONDBÓLTUR Tað eru gott og væl 18 mánaðir síðan, at hoyvíkingar lótu seg fagna sum føroyameistarar. Nú vilja hoyvíkingar vita, hvussu keðiliga gongdin verður vend

Uni Holm Johannesen

Tróndur Vatnhamar og hinir í H71 fingu ikki gjørt nógv við kollfirðingar
Mynd: Álvur Haraldsen

Meðan kollfirðingarnir á áskoðaraplássunum klappaðu, róptu og fagnaðu sínum málskjútta, royndu hoyvíkingar at greiða hvør øðrum frá, hví tað gekk so galið.

Meðan fáir hoyvíkingar klappaðu, róptu og fagnaðu sínum málskjúttum, royndu hinir hoyvíkingar at greiða hvør øðrum frá, hví tað gekk so galið.

Tað var í royndu og veru prát um besta mansliðið í Hoyvík, sum var fremst í huganum hjá hoyvíkingum seinasta hálvan tíman av dystinum.

Tað eru gott og væl 18 mánaðir síðan, at føroyameistarasteypið varð handað Halgiri Dahl-Olesen. Steypið staðfesti, at Hoyvík átti besta hondbóltsliðið í landinum.

Støðan er ein heilt onnur í dag.

Liðið er broytt munandi. Halgir Dahl-Olesen, Bárður Brimvík, Janus Søresen, Johan Hofgaard, Regin Joensen og Danni Syhler eru ikki knýttir at hópinum longur, umframt at Kári Nielsen hevur takkað fyri seg sum venjari.

Nøvnini, sum hava loyst av, eru Rógvi Sørensen, Hans Kári Hansen, Sigmund Nolsø, Rúni V. Højgaard og aðrir. Tað eru ikki spælarir, sum eru til reiðar at gera seg galdandi í bestu hondbóltsdeildini av álvara enn.

Aftaná gullrúsin og gullárið, var H71 aftast í røðini av seks liðum í fjør.

Tað eru ábendingar um, at hoyvíkingar fara heldur ikki at bjóða ovastu liðunum av í hesum kappingarárinum.

Tað staðfestu kollfirðingar, sum vunnu greitt og uppiborið í høllini í Hoyvík leygardagin.

H71 hevur einki stig fingið fyri fyrstu tveir landskappingardystirnar.

Óroyndir

Tað var lítið veiggj í hoyvíkingum.

Serliga í álopsspælinum gekk illa. Heimaliðið gjørdi fleiri púra óneyðug mistøk, sum høvdu við sær, at gestirnir sluppu aftur og aftur í skjótálop.

Levi Nybo vardi málið hjá H71. Hann stóð framúr væl undan steðginum. Málverjin vardi fyri fleiri atsóknum, og tað var orsøkin, at leiðslan var ikki størri enn TRÝ! mál í hálvleikinum.

KÍF var á odda so at siga allatíðina, hóast kollfirðingarnir misnýttu fleiri upplagdar møguleikar.

Aftaná hvíldina runnu gestirnir undan, og munurin øktist millum liðini.

Skulu hava tol

Føroyameistarar hava tað oftast trupult.

Umstøðurnar hjá venjaranum vóru ikki av teimum bestu í fjør. Nakrir av stuðulsleikarunum takkaðu fyri seg. Menn komu ikki í mans stað.

Nú skulu ungir hoyvíkingar taka við ábyrgd. Unglingar eru sjáldan støðugir í sínum avrikum í fleiri dystir upp í slag, og tí er helst neyðugt hjá hoyvíkingum at brynja seg við toli.

Tað verður helst ikki í hesum kappingarárinum, at H71 fer at bjóða oddinum av.

So komandi mánaðirnar fara hoyvíkingarnir á síðulinjuni helst at práta um, hvussu liðið aftur kann vinna dystirnar.

uni@sosialurin.fo

H71 - KÍF 25-32 (11-13)

5 min.: 3-1
10 min.: 3-3
15 min.: 5-5
20 min.: 8-6
25 min.: 8-9
35 min.: 13-16
40 min.: 15-19
45 min.: 17-23
50 min.: 19-25
55 min.: 21-29

H71: Dánjal Tórgarð 7, Bogdan Florea 5, Poul Kjartan Dam 4, Tróndur Vatnhamar 4, Esbern Pætursson 2, Hans Kári Hansen 1, Rógvi Sørensen 1.
Venjari: Daniel Rapa
KÍF: Sosialurin fekk tíverri ikki upplýst málskjúttarnar.
Venjari: Jan Ottesen

Agnar Joensen skiftir til KÍF

Agnar Joensen, sum altíð hevur umboðað barndómsfelagið VÍF, fer nú at spæla við KÍF. Kviki og stríðshugaði vestmenningurin noyðist kortini at bíða í ein mánað, áðrenn hann fer í reyðu troyggjuna hjá kollfirðingum. Um tú skiftir felag, tá landskappingin er byrjað, noyðist tú at bíða í ein mánað frá tínum seinasta landskappingardysti, áðrenn tú kann umboða nýggja felagið. Agnar Joensen hevur vant við KÍF í vikuni.

Sunset-deildin kvinnur

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	Stjørnan	3	3	0	0	92	66	26	6
2	Tjaldur	1	1	0	0	28	21	7	2
3	Kyndil	2	1	0	1	48	43	5	2
4	VÍF	3	1	0	2	74	87	-13	2
5	VB	3	1	0	2	66	80	-14	2
6	StÍF	1	0	0	1	27	32	-5	0
7	Neistin	1	0	0	1	22	28	-6	0

Leygardagin, 16. oktober:
StÍF - Stjørnan

Sunnudagin, 17. oktober:
Tjaldur - VÍF
VB - Neistin

Týsdagin, 19. oktober:
Stjørnan - Kyndil
Neistin - Tjaldur

Mynd: Álvur Haraldsen

Tjaldrið er til reiðar

HONDBÓLTUR Tjaldur hevur verið liðið, sum hevur givið Stjørnuni kapping um gullstríðið seinstu árini. Tjaldrið staðfesti í vikuskiftinum, at liðið er aftur til reiðar at bjóða í ár

Uni Holm Johannesen

Tjaldur byrjaði væl í fyrsta landskappingardystinum í hesum árinum.

VB hevur runnið aftaná oddinum seinastu kappingarárini, og við støði í dystinum í vikuskiftinum, so fara vágskvinnur eisini tað komandi mánaðirnar.

Tjaldur vann uppiborið við sjey málum. Úrslitið var 28-21.

Gjørdu bart

Ikki tí, gestirnir úr Vági stóðu seg væl.

Tær hóttu støðugt í fyrra umfarinum, og eftir hvíldina vunnu tær seg stundum framum.

Men miðskeiðis í seinna hálvleiki setti Tjaldur ferðina upp.

Cornelia Rimbu byrjaði av álvara at gera vart við seg, og hon skeyt fimm av sínum átta málum seinastu 10 minuttirnar.

Tað var høvuðsorsøkin, at munurin varð heili sjey mál tá avtornaði.

Cornelia Rimbu var eisini toppskjútti hjá heimaliðnum.

Útlendska styrkin

Tjaldur hevur vunnið seg upp millum tey fremstu í føroyskum kvinnuhondbólti eftir fáum árum.

Serliga hevur útlendska tilgongdin havt týdning, og tað er líkt til, at støðan verður ikki øðrvísi í hesum kappingarárinum.

Cornelia Rimbu og Adina Petrea stóðu fyri helminginum av málunum hjá heimaliðnum hesaferð.

Tjaldur hevur bara spælt ein landskappingardyst í hesum kappingarárinum, men tað er longu greitt, at tær, saman við Anniku Thomsen, fara at taka høvuðsleiklutirnar á seg.

uni@sosialurin.fo

Tjaldur - VB 28-21 (12-13)

5 min.: 3-1
10 min.: 6-3
15 min.: 8-5
20 min.: 8-7
25 min.: 10-10
35 min.: 12-13
40 min.: 14-15
45 min.: 17-16
50 min.: 19-19
55 min.: 22-21

Tjaldur: Cornelia Rimbu 8 (2), Adina Petra 7, Annika Thomsen 5, Sarah Ann B. Thomsen 2, Barbara Nygaard 2, Simona Petersen 2, Jóhanna í Króki 1, Benadikta Johannesen 1
Útvísingar: 5
Venjari: Bogdan Burcea
VB: Rannvá Johannesen 4, Una Egilsdóttir 4 (1), Gurið Mortensen 3, Monika Samuelsen 2, Justina Baizareviciute 2
Útvísingar: 5
Venjari: Egil Steintórsson

Áskoðarar: 100